## Diesel-prísurin nærkast bensin



Munurin millum prísin á dieselolju og bensini hevur ongan tíð verið so lítil, sum hann er júst nú. Í morgun vóru bert sjey oyru á muni í leiðandi donsku prísunum, og eisini her heima er munurin á teimum báðum brennievnunum fallin heilt nógv. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst methøgi prísurin á ráolju, sum nú er farin upp um 108 dollarar fyri tunnuna. Hartil er prísmunurin vanliga minni vetrarhálvuna, tá eftirspurningurin eftir brenniolju er høgur. Brenni- og dieselolja eru at kalla somu vørur, og tí ávirkar hetta eisini dieselprísin.

## Nei til telefonbøkur

Telefonbøkur er fortíð. Tað halda seks av tíggju norðmonnum, sum ikki ynskja at fáa tjúkku telefonbøkurnar inn um dyrnar ár um ár. Hetta framgongur av eini kanning, sum Norsk Respons hevur gjørt fyri Norges Naturvernforbund. 61% av teimum spurdu vilja sleppa undan tjúkku telefonbókunum. Av teimum, ið eru undir 60 eru 3 av 4 ið vilja verða frí, skrivar NTB. Telefonbókurnar koma út í 6,8 mill. eintøkum og viga tilsamans 9,2 mill. kg. - Okkara kanningar vísa, at 5 mill. eintøk verða óbrúktar og fara beint í ruskspannuna. Hetta er meiningsleys oyðsla av náttúruni, sigur Sverre Stakkestad frá Naturvernforbundet. Tey, sum geva út telefonbøkur í Norðurlondum eru ikki samd og vísa á, at 730.000 norðmenn nýttu telefonbøkurnar hvørja viku í tíðarskeiðnum oktober-desember 2007.

*www.business-line.fo*

# Er leiðslan á rættari kós?




*Skulu vit ikki reka av leið sum leiðarar er neyðugt at taka hædd fyri tí ráki, ið til eina og hvørja tíð er galdandi og fremja tey tiltøk ið skulu til, fyri at halda røttu kósina*

**Nýggja leiðslubókin »Den refleksive leder« gevur leiðslum eitt kærkomið høvi at umhugsa sín leiðslustíl**

LEIÐSLA
*Finnur Sivertsen,*
*Búskaparfrøðingur*
*Business-line.fo*

### Tíðir broytast

Onki av tí vit halda okkum vita um um leiðslu, er galdandi í alla tíð. Skulu vit ikki reka av leið sum leiðarar er neyðugt at taka hædd fyri tí ráki, ið til eina og hvørja tíð er galdandi og fremja tey tiltøk ið skulu til, fyri at halda røttu kósina.

Bókin "Den refleksive leder" gevur leiðslum eitt kærkomið høvi at taka eitt stig út úr gerandisdegnum og umhugsa og grunda yvir, hvat slag av leiðslustíli, ið fyritøkan ella fyrisitingin tørvar.

### Uppgerð við vanliga leiðslufatan

Í bókini avlíva rithøvundarnir Lars Goldschmidt, Søren Barlebo-Rasmussen og Ole Sten Andersen nakrar vanligar fatanir um fólk og leiðslu, t.d. "Leiðarin skal hava størri vitan enn hini" og "leiðarin hevur eina fakliga vitan, ið er sera umráðandi".

- Hesar fatanir um leiðslu eru nógv útbreiddar, siga rithøvundarnir, ikki minst tí at tær ikki eru heilt av leið. Sum leiðari skalt tú varnast tann týdning, ið leiðslan hevur fyri at fáa tey bestu úrslitini, og tey fáast bert um tú hevur eitt væl skipað og uppsett lið av starvsfólkum.




### Bjóðar praktiskan íblástur úr nýggjum leiðsluháttum

Bókin "Den refleksive leder" er ein góð handbók við praktiskum íblástri til menning av tínum leiðsluhátti.

Drívmegin og íblásturin til tey ymsu evnini í bókini koma bæði frá uppgerðini við gamlar, kendar, leiðslufatanir og eisini frá teimum kanningum, ið rithøvundarnir hava gjørt á ymsum granskingarstovnum innan leiðslu.

Útgevari er Børsens Forlag.

### Rithøvundarnir

Lars Goldschmidt er kemiverkfrøðingur (ph.d) er stjóri í felagsskapinum Rådgivende Ingeniører og starvast hjá Center for Virksomhedsudvikling og ledelsesteknologi í Keypmannahavn.

Søren Barlebo Rasmussen er ph.d. innan granskingarleiðslu hjá Institut for Ledelse, Politik og Filosofi á Copenhagen Business School í Keypmannahavn.

Ole Steen Andersen er arkitektur og HD og ein av eigarunum í ráðgevingarfelagnum Implement A/S. Hevur starvast sum ráðgevi innan projektleiðslu og menning av strategi í mong ár.